Kappingareftirlitið

**Reglugerð nr. 3 frá 7. januar 2025**
**um**
**fráboðan av almennum stuðli**

Við heimild í § 12, stk. 6, 2. pkt., í løgtingslóg nr. 72 frá 22. mai 2023 um kapping, sum broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 26. mars 2024, verður ásett:

**§ 1.** Fráboðan eftir kappingarlógini § 12, stk. 6, 2. pkt. kann latast inn til Kappingareftirlitið av:
1) Tí aðalráði ella kommunu, ið stuðulin hoyrir undir.
2) Móttakarum av almennum stuðli.

**§ 2.** Við fráboðan av almennum stuðli skulu teir í § 1, stk. 1, nr. 1, nevndu myndugleikar nýta skjal K 3, meðan teir í § 1, stk. 1, nr. 2, nevndu móttakarar skulu nýta skjal K 4. Bæði skjølini eru prentað sum ávíkavist fylgiskjal 1 og 2 til hesar reglur.

**§ 3.** Fráboðanin skal innihalda tær upplýsingar og skjøl, ið eru nevnd í skjølunum K 3 ella K 4.
*Stk. 2.* Kappingareftirlitið kann eftir umbøn heilt ella lutvíst sleppa einum undan skylduni at lata inn upplýsingar og skjøl, ið eru nevnd í skjølunum K 3 ella K 4, um Kappingareftirlitið metir, at upplýsingarnar og skjølini ikki eru neyðug til kanning av málinum.
*Stk. 3.* Kappingareftirlitið skal innan 2 vikur vátta fyri móttøku av fráboðanini.
*Stk. 4.* Um Kappingareftirlitið staðfestir, at upplýsingarnar í eini fráboðan ella fylgiskjølunum eru ófullfíggjaðar, gevur eftirlitið fráboðaranum boð um hetta og ásetir eina hóskandi freist at leggja afturat upplýsingunum.
*Stk. 5.* Fráboðarin skal av sínum eintingum og beinanvegin geva Kappingareftirlitinum boð um munandi broytingar í teimum viðurskiftum, sum eru ávíst í fráboðanini, og sum fráboðarin eigur at hava kunnleika til.

**§ 4.** Ein fráboðan ella áheitan fær rættarvirknað, eftir at Kappingareftirlitið hevur tikið ímóti eini fullfíggjaðari og rættari fráboðan ella áheitan sum ávíst í § 3.

**§ 5.** Henda reglugerð kemur í gildi tann 7. januar 2025. Reglugerð nr. 3 frá 10. januar 2008 um fráboðan av almennum stuðli fer úr gildi sama dag.

Kappingareftirlitið, tann 7. januar 2025

Heri Joensen
Formaður í Kappingarráðnum

/ Terje Sigurðsson
Deildarstjóri í Kappingareftirlitinum

**FYLGJISKJAL 1**

# K 3

# SKJAL TIL FRÁBOÐAN AV ALMENNUM STUÐLI TIL KAPPINGAREFTIRLITIÐ

(Við heimild í § 12, stk. 6, 2. pkt., í løgtingslóg nr. 72 frá 22. Mai 2023 um kapping)

nýtast til

Umsókn um ikki-ippíløgu mótvegis tillutan av almennum stuðli

av

tí Aðalráði ella kommunu, ið stuðulin hoyrir undir

---

*Myndugleikin fráboðar í K 3 skjalinum*

**1. Upplýsingar um myndugleikan, ið stuðulin hoyrir undir, og tann sum sendir inn fráboðan**

A. Fráboðari

| | |
|---|---|
| Myndugleiki: | |
| Bústaður: | Post nr og býur: |
| Kontaktpersónur: | Beinleiðis tlf nr: |
| Tlf nr: | Fartelefon nr: |
| Teldupostur: | |

B. Umboð fyri fráboðara

| | |
|---|---|
| Navn og starv: | |
| Bústaður: | Post nr og býur: |
| Tlf nr: | Fartelefon nr: |
| Teldupostur: | |

**2. Við heimild í hvørjari almennari áseting er ella verður stuðulin ella kostnaðarfulnaður veittur?**

**3. Almennur ella einstaklingastuðul**

Set kross, um:

□ stuðulin/kostnaðarfulnaðurin verður veittur sum partur av eini stuðulsskipan (beind móti fleiri fyritøkum)

□ stuðulin/kostnaðarfulnaðurin verður veittur sum einstaklingastuðul/kostnaðarfulnaður (beindur móti einari fyritøku).

**4. Hvussu verður stuðulin ella kostnaðarfulnaðurin veittur, og hvussu stórur er hann (1.000 kr.)?**

**5. Legg hjá eitt yvirlit yvir fyritøkurnar, sum fáa veittan stuðul.**
**Um talan er um eina stuðulsskipan skulu spurningarnir í punkti 8 og punktunum 11-15 svarast. Er talan um einstaklingastuðul/kostnaðarfulnað skulu spurningarnir í punktunum 9-15 svarast.**

**6. Stuðulsskipan**

1. Greið frá stuðulsskipanini, herímillum gildistíð, endamáli, móttakarum av stuðli og fíggjarætlan.
2. Hvørji krøv verða nýtt at luta sundur stuðulin?
3. Fevnir stuðulin heilt um útreiðslurnar hjá móttakaranum?
4. Hvussu verður tryggjað, at ov nógv endurgjald ikki verður veitt?
5. Hvussu verður eftirlit havt við, at stuðulin verður nýttur til ætlaða endamálið?
6. Verður stuðulin mettur at vera kappingaravlagandi? Hví/hví ikki?

**7. Stuðul ella kostnaðarfulnaður av einstaklinga vinnuvirksemi**

1. Greið frá bakgrundini fyri at vinnuvirksemi er sett í verk.
2. Greið frá vavinum á vinnuvirkseminum, ið metast skal um við atliti at stuðli.
3. Greið frá ella legg hjá síðstu roknskapirnar ella fíggjarætlanir fyri inntøkur og útreiðslur, ið
4. hava tilknýti til vinnuvirksemið.
5. Greið frá hvussu útreiðslurnar av vinnuvirkseminum í sambandi við nýtslu av arbeiðsorku,
6. nýtslu av útbúnaði og maskinum (keyp, leiga ella avskrivingar), fyrisiting og aðrar útreiðslur eru roknaðar út, og hvussu tær eru partur av prísinum á seldu veitingunum.
7. Hvussu verður tryggjað, at ov nógv endurgjald ikki verður veitt?
8. Verður stuðulin ella kostnaðarfulnaðurin av vinnuvirkseminum mettur at vera
9. kappingaravlagandi? Hví/Hví ikki?

**8. Beinleiðis einstaklingastuðul**

1. Sambært hvørjum krøvum er stuðulin veittur?
2. Hevur móttakari av stuðli áður fingið veitt stuðul til aðrar, møguliga líknandi, uppgávur?
3. Hvussu verður eftirlit havt við, at stuðulin verður nýttur til ætlaða endamálið?

**9. Set kross □, um móttakari/ar av stuðli er kunnaður um fráboðanina**

**10. Set kross □, um allar tær í skjali K 3 nevndu upplýsingar eru hjálagdar**

**11. Aðrar viðkomandi upplýsingar**

Undir hesum punkti kunna aðrar upplýsingar sendast inn ella leggjast hjá, ið metast hava týdning fyri viðgerðina av málinum, t.d. avrit av almennu ásetingini, ið heimilar stuðulin, ella kunnandi tilfar ætlað móttakara av stuðlinum.

## 12. Váttan

Undirritaði váttar, at upplýsingarnar í hesi fráboðan eru rættar, at fullfíggjað avrit av øllum teimum í K 3 kravdu skjølum eru hjáløgd, og at øll úttalilsir eru givin í góðari trúgv. Um váttanin verður givin av øðrum myndugleika enn tí, ið almenni stuðulin hoyrir undir, ábyrgdast undirritaði, at upplýsingarnar v.m. eru givnar vegna viðkomandi myndugleika.

Undirritaði og allar tær fráboðandi fyritøkurnar eru kunnugar við revsireglurnar í §§ 34-36 í kappingarlógini.

| |
|---|
| Stað og dagfesting: |
| Undirskrift: |
| Stað og dagfesting: |
| Undirskrift: |
| Stað og dagfesting: |
| Undirskrift: |
| Stað og dagfesting: |
| Undirskrift: |

## 13. At fylla út og senda inn

Skjal K 3 verður fylt út og sent inn til:

Kappingareftirlitið
Skálatrøð 20
Postsmoga 73
FO-110 Tórshavn
Telefon: +298 35 60 40
Teldupostur: kapping@kapping.fo

Kappingareftirlitið

FYLGISKJAL 2

# K 4

# SKJAL TIL FRÁBOÐAN AV ALMENNUM STUÐLI TIL KAPPINGAREFTIRLITIÐ

(Við heimild í § 12, stk. 6, 2. pkt., í løgtingslóg nr. 35 frá 3. mai 2007 um kapping,)

nýtast til

umsókn um ikki-uppíløgu mótvegis tillutan av almennum stuðli

av

tí ella teimum fyritøkum, ið fáa stuðulin ella kostnaðarfulnaðin

---

*Tann sum fær stuðul fráboðar eftir K4 skjalinum*

## 1. Upplýsingar um fyritøku/r, ið fáa almennan stuðul ella kostnaðarfulnað, og tann ið sendir inn fráboðan

A. Fráboðari

| | |
|---|---|
| Navn: | |
| Partafelagsnummar: | V-tal: |
| Bústaður: | Post nr og býur: |
| Kontaktpersónur: | Beinleiðis tlf nr: |
| Tlf nr: | Fartelefon nr: |
| Teldupostur: | |
| Vinnugrein: | |

B. Umboð fyri fráboðara

| | |
|---|---|
| Navn og starv: | |
| Bústaður: | Post nr og býur: |
| Tlf nr: | Fartelefon nr: |
| Teldupostur: | |

## 2.Við heimild í hvørjari almennari áseting er ella verður stuðulin ella kostnaðarfulnaðurin veittur?

## 3. Slag av stuðli

Set kross, um:

□ stuðulin/kostnaðarfulnaðurin verður veittur sum partur av eini stuðulsskipan (beind móti fleiri fyritøkum),

□ stuðulin/kostnaðarfulnaðurin verður veittur sum einstaklingastuðul/kostnaðarfulnaður (beindur móti einari fyritøku).

□ stuðulin/kostnaðarfulnaðurin verður veittur sum beinleiðis stuðul/kostnaðarfulnaður,

□ stuðulin/kostnaðarfulnaðurin verður veittur sum óbeinleiðis stuðul/kostnaðarfulnaður

**4. Hvussu verður stuðulin/kostnaðarfulnaðurin veittur, og hvussu stórur er hann (1.000 kr.)**

**5. Greið stutt frá tilgongdini í sambandi við umsóknina, ið førdi við sær, at stuðul varð veittur. Sambært hvørjum krøvum er stuðulin/kostnaðarfulnaðurin veittur?**

**6. Móttakarans viðurskifti**

1. Hvussu er fyritøkan skipað løgfrøðiliga?
2. Hvussu stórur var ársumsetningurin hjá fyritøkuni fyri tey síðstu trý roknskaparárini (1.000kr.)?
3. Er stuðulin avgerðandi fyri at kunna taka lut virkseminum? Grundgev nærri.
4. Broytir stuðulin/kostnaðarfulnaðurin framleiðslustøddina ella søluna hjá fyritøkuni?
5. Førir stuðulin/ kostnaðarfulnaðurin við sær, at fyritøkan fer inn á nýggjar marknaðir?
6. Hevur stuðulin / kostnaðarfulnaðurin týdning fyri, at fyritøkan kann standa seg í framtíðini?
7. Hevur fyritøkan áður fingið veitt stuðul/ kostnaðarfulnaðurin til aðrar, møguliga líknandi, uppgávur?
8. Kann stuðulin metast at vera kappingaravlagandi? Greiðast skal frá, um stuðulin verður mettur, beinleiðis ella óbeinleiðis, at hava til endamáls ella fylgju at avlaga kappingina.

**7. Marknaðarlýsing**

**7.1** - Greið stutt frá teimum marknaðum, ið hava tilknýti til vinnuvirksemið hjá fyritøkuni:

1. Viðkomandi vørumarknaði ella vørumarknaðum, t.v.s. tí ella teimum vørumarknaðum, har fyritøkan virkar.
2. Nær skyldir marknaðir, t.v.s. vørumarknaðir, ið eru ymiskir frá tí viðkomandi marknaðinum, men sum hava tætt tilknýti til viðkomandi marknaðin gjøgnum felags eyðkenni, t.d. eins tøkni, kundar ella veitarar.
3. Landafrøðiliga marknaðinum (altjóða, Føroyar ella partur av hesum) fyri báðar omanfyrinevndu marknaðir.

**7.2** - Upplýs fyri hvønn ávirkaðan vørumarknað, ið er nevndur í punkti 7.1.:

1. Eina meting av ársumsetninginum av vørum, ið fáa veittan stuðul.
2. Ársumsetningin hjá fyritøkuni.
3. Marknaðarpart hjá fyritøkuni.

**7.3** – Greið frá:

1. Veitarabygnaðinum hjá fyritøkuni á innkeypsmarknaðinum, t.v.s. tann marknaður, har fyritøkan fær sínar veitingar.
2. Útboðsbygnaðinum hjá fyritøkuni á sølumarknaðinum, t.v.s. sølurásir og tænastunet, herímillum um sølan hjá fyritøkuni verður framd gjøgnum fyritøkuna sjálva ella gjøgnum triðjamann.
3. Eftirspurningsbygnaðinum hjá fyritøkuni á sølumarknaðinum, herímillum kundakonsentratión, kundabólkar, kundaforrættindi og vørusundurbýting.

## 8. Kappingarneytar, veitarar og støðan hjá kundum á teimum ávirkaðu marknaðunum

1. Tríggjar teir størstu kappingarneytarnar, og met um marknaðarpartin hjá teimum á viðkomandi marknaði. Upplýs nøvn, bústaðir og møgulig telefonnummur hjá hesum kappingarneytum. Møgulig teldupostadressa og kontaktpersónur hjá hesum fyritøkum skulu eisini upplýsast, um fráboðarin hevur kunnleika til hetta.
2. Tríggjar teir størstu veitararnar og partin hjá hesum av innkeypinum av viðkomandi vøru ella tænastuveiting hjá fyritøkuni. Upplýs nøvn, bústaðir og møgulig telefonnummur hjá hesum veitarum. Møgulig teldupostadressa og kontaktpersónur hjá hesum veitarum skulu eisini upplýsast, um fráboðarin hevur kunnleika til hetta.
3. Tríggjar teir størstu kundarnar og partin hjá hesum av søluni av viðkomandi vøru ella tænastuveiting hjá fyritøkuni. Upplýs nøvn, bústaðir og møgulig telefonnummur hjá hesum kundum. Møgulig teldupostadressa og kontaktpersónur hjá hesum kundum skulu eisini upplýsast, um fráboðarin hevur kunnleika til hetta.

## 9. Atgongdin til marknaðin og møgulig kapping

**9.1** - Greið frá møguligum forðingum hjá fyritøkum, ið hava ynski um at fáa atgongd til viðkomandi og nær skyldir marknaðir, m.a við atliti at fylgjandi:

1. Meting av øllum útreiðslunum, ið standast av at byrja og koma inn á marknaðin.
2. Í hvønn mun hevur tygara fyritøka fingið loyvi til patent, serkunnleika ella líknandi.
3. Aðrar forðingar fyri atgongd, eitt nú ræði á undirstøðikervi, atgongd til ráevni, kunda- ella veitaratrúskapur, lógarásettar forðingar fyri atgongd v.m.

**9.2** - Um nøkur nýggj fyritøka innan tey síðstu trý árini hevur útvegað sær atgongd til viðkomandi vørumarknaðin í teimum landafrøðiligu økjunum, har tygara fyritøka marknaðarførir sínar vørur og tænastuveitingar, skulu nøvn, bústaðir og møgulig telefonnummur hjá hesum fyritøkum upplýsast.

**10. Set kross □, um myndugleikin, ið veitir stuðulin/kostnaðarfulnaðurin er kunnaður um fráboðanina**

**11. Set kross □, um allar tær í skjali K4 kravdu upplýsingar eru latnar**

**12. Aðrar viðkomandi upplýsingar**

Undir hesum punkti kunnu aðrar upplýsingar sendast inn ella leggjast hjá, ið metast hava týdning fyri viðgerðina av sakini, t.d. avrit av almennu ásetingini, ið heimilar stuðulin, ella kunnandi tilfar ætlað móttakara av stuðlinum.

**13. Váttan**

Undirritaði váttar, at upplýsingarnar í hesi fráboðan eru rættar, at fullfíggjað avrit av øllum teimum í K 4 kravdu skjølum eru hjáløgd, og at øll úttalilsi eru givin í góðari trúgv. Um váttanin verður givin av øðrum myndugleika enn tí, ið almenni stuðulin hoyrir undir, ábyrgdast undirritaði, at upplýsingarnar v.m. eru givnar vegna viðkomandi myndugleika.

Undirritaði og allar tær fráboðandi fyritøkurnar eru kunnugar við revsireglurnar í §§ 22 og 23 í kappingarlógini.

| |
|---|
| Stað og dagfesting: |
| Undirskrift: |
| Stað og dagfesting: |
| Undirskrift: |
| Stað og dagfesting: |
| Undirskrift: |
| Stað og dagfesting: |
| Undirskrift: |

## 14. At fylla út og senda inn

Skjal K 4 verður fylt út og sent inn til:

| |
|---|
| Kappingareftirlitið<br>Skálatrøð 20<br>Postsmoga 73<br>FO-110 Tórshavn<br>Telefon: +298 35 60 40<br>Teldupostur: kapping@kapping.fo |